FØROYATELE

# Lesandi og áhugað fyri HR?

**Hevur tú hug at royna teg í einari framkomnari, tekniskari fyritøku, ið vil vera best á øllum økjum? Tú hevur nú møguleika at koma í starvslæru á Starvsfólkadeildini á Føroya Tele. Vit kunnu bjóða tær eina avbjóðandi, fjølbroytta og spennandi starvslæru, ið leggur lunnar undir bæði fakliga og persónliga menning.**

## Hvat kanst tú vænta?

Saman við deildini fært tú møguleika at mynda og røkja uppgávur á starvsfólkaøkinum. Uppgávurnar í starvslæruni fevna breitt, og tú verður við til at tryggja, at hesar verða avgreiddar við nærlagni og skynsemi. Uppgávurnar fevna millum annað um:

- At tilevna fakligt tilfar til leiðarar og starvsfólk
- Innanhýsis kunning og samskifti
- Samskipan av tiltøkum
- Sparring saman við deildini í mun til tilgongdir, verkætlanir og menning
- Tvørgangandi samstarv við deildir í samtakinum
- Fyrisitingarligar uppgávur

## Um teg

Vit ímynda okkum, at tú ert undir viðkomandi lestna á bachelor- ella kandidatstøði. Vit hava í væntu, at tú:

- Hevur áhuga og áræði at arbeiða við uppgávum innan bæði menning og fyrisiting
- Dugir væl at orða teg í skrift og talu – serliga á føroyskum
- Ert proaktiv/ur, jalig/ur og sært møguleikar framum forðingar
- Hevur góð samstarvsevnir, men dugir samstundis væl at arbeiða sjálvstøðugt

## Samband

Arbeiðsstaður er í høvuðssætinum hjá Føroya Tele í Hoyvík, og starvslæran verður í seinna hálvári í 2019 ella ásett eftir nærri avtalu. Hevur starvslæran tín áhuga, ert tú vælkomin at senda ein fyrispurning til Starvsfólkadeildina á sfd@ft.fo.

Ynskir tú at fáa meira at vita um starvslæruna, ert tú vælkomin at seta teg í samband við:

- Evu Skeel Nolsø, HR- og marknaðarstjóra, á tel. 243007 ella esn@ft.fo
- Rakul S. Róadóttir, HR-ráðgeva, á tel. 243006 ella rsr@ft.fo